VEÐRIÐ

Petur Skeel Jacobsen greiður frá um veðrið



Veðrið í morgin:
Hvassur vindur ella skrið av landnyrðingi, um kvøldið minni vindur av norði. Kavaælingur, men eisini sólglottar og hitin millum frostmarkið og +3 stig.



Veðrið hósdagin:
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og norði og sólglottar, men eisini okkurt kavaælið. Hitin millum 1 og 4 stig.



Veðrið fríggjadagin:
Gul til stívt andøvsgul av landsynningi og eystri og regn av og á. Hitin millum 3 og 6 stig.

Veðrið leygardagin og sunnudagin:
Hann veksur vindin upp í hvassan vind av landnyrðingi og norði og kavaælingur, men eisini sólglottar. Hitalagið millum ÷1 og +3 stig.

Norröna á veg til Danmarkar

Eftir at hava ligið og krokað í Bergen síðani leygarkvøldið er Norrøna nú á veg til Hanstholm.

SJÓVINNA
Árni Joensen:
arni@sosialurin.fo

Norrøna fór úr Bergen klokkan gott fýra í morgun, og gongst sum ætlað kemur hon til Hanstholm klokkan hálvgum átta í kvøld. Hon siglir aftur stutt eftir midnátt til Bergen og síðani til Føroya.

Hesin túrurin hjá Norrønu er drúgvur, og tá skipið ætlandi kemur aftur á Havnina hósdagin, hevur tað næstan verið burturi í eina viku.

Norrøna fór av Havnini fríggjamorgunin til Bergen. Tá skipið leygardagin var á veg til Hanstholm, gjørdi skiparin av at venda aftur, tí veðrið var so ringt. Samstundis vísti tað seg, at Norrøna kundi ikki sleppa til Frederikshavn, tí ein onnur ferja hevði slitið inni í havnini har.

Norrøna hevði ikki kunnað lagt at í Hanstholm um vikuskiftið, tí har var av ringasta veðri. Vindferðin var upp í 30 metrar um sekundið, og aldan uppi fyri brimgarðarnar var næstan 12 metrar høg. Í Bergen høvdu tey ikki havt so ringt veður í 13 ár, men har var eingin trupulleiki at leggja at, tí har er læ.

Í dag er betri veður. Um middagsleitið var vindferðin í Hanstholm um 12 metrar um sekundið, og alduhæddin uttan fyri brimgarðarnar lá millum fýra og seks metrar.

Hitalagið kring knøttin

Illulisat	-19
Nuuk	-13
Qaqortoq	-3
Ammassalik	-16
Saint John's	--
Halifax	--
Reykjavík	-6
Seyðisfjørður	-3
Tórshavn	--
Lerwick	1
Aberdeen	3
London	8
Tromsø	--
Bergen	0
Oslo	--
Stokkhólm	5
Keypmannah.	9
Helsinki	0
Moskva	8
Berlin	12
Warzawa	12
Kiev	7
Bukarest	6
Paris	12
Madrid	4
Róm	15
Malorca	17
Athen	12
Malta	16
Tunis	17
Beijing	1
New Dehli	15
Bangkok	32
Jakarta	34
Sydney	--
New York	1
Miami	16
Los Angeles	15
Meksikobýur	15
Panama	--
La Paz	7
Rio de Janeiro	--
Buenos Aires	28

LUFTTRÝSTIÐ



Í gjár:
Eitt lágtrýst, 978 hPa. í landsynning úr Hvarvinum stendur mestsum í stað. Eitt annað lágtrýst, 1013 hPa. sunnan fyri Írland fer í landnyrðing og dýpist.



Í dag:
Lágtrýstið skamt sunnan fyri Føroyar fer eystureftir

HITALAGIÐ



Hitalagið mált frá 10/1 kl. 06^{00}– 11/1. 06^{00}. Hitin í gjár: 4,3°
Minsti hiti máldur í januar: -10° - Mesti hiti máldur í januar: 3,4°

AVFALLIÐ



Avfallið: 3,0 mm – mált frá 10/1 kl. 06^{00}– 11/1 kl. 06^{00}
Avfallið higartil í januar: 17,0 mm

Brúðarlín
v/ Anniku Gaard
Fagralíð 22
Tlf./Fax. 314281
Brúðar- og brúðargentukjólar við tilhoyri til leigu
Nýggir kjólar kunnu útvegast
www.brudarlin.com

Sosialurin
- altíð eitt tiltak miðlahúsinum
Tiltøk í januar
18. januar
Handarbeiðsbúðin
27. januar
Aglow

VESTFALLSKYRRINDI

10. januar Mánin longst frá jørðini
11. januar Seinna kvarter
19. januar Tendring
22. januar Mánin næstur jørðini

Kelda: Almanakkin 2006

Dagur	Suðuroyar-/Vágafirði fp.	sp.	Skúvoyar-/Skopunarfirði fp.	sp.	Hestfirði/Sundalagnum fp.	sp.	Vestmanna-sundi fp.	sp.	Mykines-firði fp.	sp.	Nólsoyar-firði fp.	sp.	2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp.	sp.	Leirvíksfirði/Haraldssundi fp.	sp.	Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp.	sp.	Hvanna-sundi fp.	sp.	Fugloyar-firði fp.	sp.
16. Jan	04.04	16.28	03.04	15.28	03.19	15.43	06.04	18.28	07.04	19.28	02.19	14.43	01.19	13.43	04.19	16.43	05.19	17.43	03.49	16.13	05.04	17.28
17. Jan	04.54	17.20	03.54	16.20	04.09	16.35	06.54	19.20	07.54	20.20	03.09	15.35	02.09	14.35	05.09	17.35	06.09	18.35	04.39	17.05	05.54	18.20
18. Jan	05.48	18.16	04.48	17.16	05.03	17.31	07.48	20.16	08.48	21.16	04.03	16.31	03.03	15.31	06.03	18.31	07.03	19.31	05.33	18.01	06.48	19.16
19. Jan	06.42	19.08	05.42	18.08	05.57	18.23	08.42	21.08	09.42	22.08	04.57	17.23	03.57	16.23	06.57	19.23	07.57	20.23	06.27	18.53	07.42	20.08
20. Jan	07.32	19.56	06.32	18.56	06.47	19.11	09.32	21.56	10.32	22.56	05.47	18.11	04.47	17.11	07.47	20.11	08.47	21.11	07.17	19.41	08.32	20.56